## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi, seinni lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 7 og10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og regn av og á. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men týsdagin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Barnabati gevur jólakalendara út




Jólakalendarin hesaferð er teknaður av Bent Erdland. Jólakalendarin lýsir sera heppi virksemið hjá Barnabata í Føroyum og øðrum Red Barnet felagsskapum í Norðanlondum og vísir somuleiðis á onnur lond, har slíkir felagsskapir virka ella útinna arbeiði sítt.

Jólakalendarin fæst í øllum Shellstøðum kring landið, er talmerktur og er samstundis ein lutaseðil. Høvuðsvinningurin er ein páskatúrur 2005 við Smyril Line í 1 viku í Danland fyri 2 vaksin og 2 børn við bili aftur og fram.

Kostnaðurin er 40 kr. eintakið, og fer peningurin óskerdur til arbeiðið hjá Barnabata.

Endamálið hjá Barnabata er at betra um korini hjá børnum í Føroyum og øðrum londum, har korini ofta eru sera ring hjá hesum bólki. Hetta verður gjørt í samstarvi við aðrar líknandi stovnar, sum allir arbeiða við atliti til sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi barnanna. Sáttmálin er enn ikki ein partur av føroyskari løggávu, men Løgtingið samtykti fyri meira enn tíggju árum síðani tvs. 9. apríl 1992 at hesin sáttmáli skuldi vera galdandi fyri Føroyar. Føroyar hava við staðfestingini átikið sær at tryggja, at rættarstøða barnanna - í løggávu og fyristingarligari siðvenju - eru í samljóð við endamálið við sáttmálanum.

Barnabati varð stovnað 22. mars 1980, t.e. árið eftir altjóðað barnaárið 1979. Tá vóru fleiri lokalfeløg runt um í landinum við ymiskum aktivitetum, men sum frá leið minkaði aktiviteturin, tí hesin var so bundin av ávísum persónum. Tí er tað bert Landsfelagið í Havn, sum enn er virkið, og ætlanin er komandi ár at verða meira sjónlig aftur.

Barnabati hevur umboð í Føroya einkjugrunni, í stýrinum hjá Føroya Barnaheimi og í húsaráðnum fyri Margarinfabrikkina í Havn.

Nevndin er soleiðis skipað í løtuni:

Hensia Einarsson, formaður, tlf. 31954, e-mail: hensia.einarsson@kallnet.fo

Súsanna í Stórhúsi, kassameistari tlf. 317526 e- mail sis@vmr.fo

Jákup Mørkøre, skrivari tlf. 313914 e-mail: jak-moer@post olivant.fo

Peturbjørg Jensen, nevndarlimur tlf. 314008 e-mail: pj@kaerustovnur.fo

Elna Strøm, nevndarlimur tlf. 322030 e-mail: hjaelnu@post.olivant.fo

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 3 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 11 |
| Tromsø | 5 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 8 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 9 |
| Madrid | – |
| Róm | 19 |
| Malorca | – |
| Athen | 21 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 17 |
| New York | 15 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 21 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt stormlágtrýst, 959 hPa. við Írland fer spakuliga í landsynning og grynnist. Eitt hátrýst, 1022 hPa. yvir Atlantshavinum stendur mestsum í stað og viknar. Ein veikur hátrýstryggur til Íslands verður yvir Føroyum fríggjakvøldið.




Lágtrýstið sunnan fyri Írland fer í landsynning og grynnist. Lágtrýstið norðanfyri Ísland fer í landnyrðing.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 27/10 kl. 06⁰⁰–28/10. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,2°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,6 mm – mált frá 27/10 kl. 06⁰⁰–28/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 100,2 mm




**Vika 44 – 27. oktober**
Vinnaratøl: **01 - 03 - 09 - 12 - 23 - 26**

Eykatøl: **33 - 40**

Supertal hesa vikuna: **27**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | **1.366.531,- kr.** |
| 5 vinnarat.+ eykatal | **53.309,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **2.290,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **84,- kr.** |
| 3 vinnaratøl: | **31,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

28. oktober: Fullmáni
2. novemb.: Mánin longst frá jørðini
5. novemb.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. okt | 08.06 | 20.28 | 07.06 | 19.28 | 07.21 | 19.43 | 10.06 | 22.28 | 11.06 | 23.28 | 06.21 | 18.43 | 05.21 | 17.43 | 08.21 | 20.43 | 09.21 | 21.43 | 07.51 | 20.13 | 09.06 | 21.28 |
| 30. okt | 08.50 | 21.13 | 07.50 | 20.13 | 08.05 | 20.28 | 10.50 | 23.13 | 11.50 | — | 07.05 | 19.28 | 06.05 | 18.28 | 09.05 | 21.28 | 10.05 | 22.28 | 08.35 | 20.58 | 09.50 | 22.13 |
| 31. okt | 08.36 | 21.00 | 07.36 | 20.00 | 07.51 | 20.15 | 10.36 | 23.00 | 11.36 | 24.00 | 06.51 | 19.15 | 05.51 | 18.15 | 08.51 | 21.15 | 09.51 | 22.15 | 08.21 | 20.45 | 09.36 | 22.00 |
| 1. nov | 09.24 | 21.49 | 08.24 | 20.49 | 08.39 | 21.04 | 11.24 | 23.49 | 00.00 | 12.24 | 07.39 | 20.04 | 06.39 | 19.04 | 09.39 | 22.04 | 10.39 | 23.04 | 09.09 | 21.34 | 10.24 | 22.49 |

5 707265 100050 >